**Fra:** Atli Suni Leo
**Sendt:** 23. mars 2015 11:18
**Til:** Terji Petersen
**Cc:** Bjarni Askham Bjarnason; Turid Arge; Leif Abrahamsen; Brynleif Poulsen
**Emne:** Svar til fyrispurning frá Heilsumálaráðnum um endurgjald Heilsumálaráðið er dømt at gjalda

Góði Terji

Fíggjarmálaráðið hevur viðgjørt fyrispurning frá Heilsumálaráðnum um hvussu berast skal at útgjaldsliga, roknskaparliga og játtanarliga í sambandi við endurgjald (íroknað processrentu og sakarmálskostnað) Heilsumálaráðið í Landsrættinum er dømt at gjalda.

Endurgjald, sum er ein staðfest útreiðsla áløgd við dómi, er at líkna við lógarbundna játtan, har skylda er at gjalda krav móti landskassanum, óansæð um játtan er tøk.

Í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan er ásett í § 6: "Hevur persónur við lóg vunnið rætt til ávísa stuðulsupphædd, skal avvarðandi myndugleiki gjalda stuðulsupphæddina, hóast játtanin ikki røkkur."

Tískil hevur Heilsumálaráðið skyldu til beinanvegin at gjalda endurgjald sambært álagda dóminum.

Henda mannagongd verður ikki mett at vera í andsøgn við ásetingina í Stýrisskipanarlógini § 43, stk. 2: "Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður." Ásetingin "eingin útreiðsla má verða goldin" skal skiljast sum, at "eingin útreiðsla má verða hildin", eins og danska týðingin áður tilskilaði, og sum er einsljóðandi við ásetingina í §46, stk. 2 í donsku Grundlógini. Ásetingin "ingen udgift må afholdes " ella "eingin útreiðsla má verða hildin" sipar til atgerðarløtuna (disponeringstidspunktet), tá ið støðu verður tikin til at halda eina útreiðsla. Ásetingin tilskilar, at játtan í fíggjarlóg ella eykajáttan skal vera tøk forút fyri atgerðini (disponeringini) fyri eini útreiðslu.

Í ítøkiliga málinum um endurgjaldið sum Heilsumálaráðið er dømt at gjalda, er staðfesti dómurin eitt krav um útgjald fyri tænastur, sum liggja langt aftur í tíð, t.e. at atgerðirnar langt síðani eru framdar. Tískil er ásetingin í §43, stk. 2 í Stýrisskipanarlógini ikki hildin, og fortreytin fyri eykajáttan er ikki til staðar, og útreiðslan má sostatt verða staðfest í roknskapinum.

Roknskaparlig meginregla tilskilar, at útgoldna upphæddin verður tikin so skjótt sum til ber.

Í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t. er ásett í § 13, stk. 2: "Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu tær verða skrásettar, so skjótt, upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi."

Hóast endaligi dómurin er sagdur nú í mars 2015, so er kravið væl eldri. Gjørligt er at skráseta nýtsluna í roknskaparárinum 2014, sum enn er opið. Tá verður nýtslan staðfest í roknskapinum fyri 2014 uttan nakra játtanarliga viðgerð.

Um valt verður heldur at skráseta nýtsluna í 2015, kann, um neyðugt, verða biðið um eykajáttan aftaná til óhepnu avleiðingarnar av, at nýtsla til endurgjaldið minkar um tøku játtanirnar í 2015 til ætlaða virksemi hjá Heilsumálaráðnum og Serviðgerð uttanlands (Landssjúkrahúsið).

Vh Atli Suni Leo
Ráðgevi